# Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

**Maritim fyrireiking**
Um nóg nógv tekna seg, byrjar nýtt skeið í maritimari fyrireiking mánadagin 7. august 2000 og endar við próvtøku í desember 2000. Lokið prógv gevur atgongd til víðari lestur á maskinmeistaraskúla og navigatiónsskúla. Til ber at søkja útbúgvingarstuðul.

**Støddfrøði á hægri støði**
Um nóg nógv tekna seg, skipar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli – í samstarvi við Maskinmeistaraskúlan og samráð við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum – fyri skeiði í støddfrøði á hægri støði fyri maskinmeistarar og onnur.

Skeiðið er ætlað sum partvísur sjálvlestur, og byrjar týsdagin 1. august 2000 og endar við skrivligari og munnligari próvtøku um miðjan oktober 2000. *Lokið prógv gevur atgongd til støðisútbúgvingina í stødd- og alisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, treytað av, at kunnleikin til alis- og evnafrøði eisini kann góðtakast.*

**Upptøkukrøv:**
- maskinmeistaraprógv
- skipsføraraprógv
- studentsprógv við støddfrøði B, alisfrøði B og evnafrøði C ella
- onnur tilsvarandi útbúgving í støddfrøði og alis-/evnafrøði.

**Høvuðsevnini í undirvísingini eru:**
Vektorar í 2 og 3 dimensiónum, vektorfunktiónir, serligar funktiónir, markvirði, infinitesimalrokning, differentialrokning, integralrokning, differentiallíkningar.

**Undirvísingartilfar:**
Preben Madsen: Teknisk matematik bind 2 og 3.
Erhvervsskolernes forlag 1997
Hewlett Packard:
HP48 roknimaskina og HP48 Brugerhåndbog. *Fæst til keyps á Maskinmeistaraskúlanum.*

**Tilmelding:**
**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**
Frúutrøð 1 • Postboks 353 • 110 Tórshavn
Tlf. 317755 • Telefax 318250

# Skrivari/ málsviðgeri

**Til trivnaðarfyrisitingina, sosialu deild verður søkt eftir skrivara/málsvigera at byrja skjótast tilber.**

**Høvuðsuppgávur**
Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá skrivaranum/málsviðgeranum eru:
- Skriva fundarskráir og fundarfrásagnir
- Fyrireika, geva boð og skipa fyri, tá fundir eru
- Edv-skráseta allar útgjaldingar eftir forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini, sum kommunan skal hava endurgoldið
- Hava eftirlit við og avstemma konti hjá sosialu deild
- Ymiskar málsviðgerðaruppgávur

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra relevanta útbúgving. Skal hava kunnleika til bókhald, tekstviðgerð og rokniark á brúkarastøði. Skal duga føroyskt til lítar.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 15. lønarflokki sambært sáttmálanum við Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi íseinasta lagi 10. juli 2000.

Tórshavnar kommuna

WWW.TORSHAVN.FO

# Leirvíkar Skúli

Søkt verður eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2000/2001, til at undirvísa í umleið 24 tímar um vikuna.

Starvið er lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlan, tlf. 443234 ella 443192 (skúlaleiðaran).

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 30. juni 2000.

**Leirvíkar Skúlanevnd**
Att.: Adelbert Ellingsgaard
520 Leirvík

# Sethús í Lamba til sølu



Húsini, ið eru væl hildin, standa í friðarligum, náttúruvøkrum umhvørvi við góðum útsýni.

Grundøkið, matr. nr. 29e, er 854 m².
Húsini eru bygd í 1975 og eru 250 m² til víddar.
Kjallarahæddin: Kjallararúm, gongd, stova v/ køki, vaskirúm og fýrrúm.
Miðhæddin: Stova, køkur, wc og gongd.
Loftshæddin: 4 kømur, baðirúm og gongd.
Rúmligur hjallur og garaga við terassu á.
Rundan um húsini er væl røktur urtagarður.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað kunnu síggja húsini eftir nærri avtalu við at venda sær til tlf. 447761 ella 283533, fax 319736.

# Fá ókeypis ráðgeving áðrenn tú byrjar nýtt virki

Hugsar tú um at byrja við egnum virki? So kannst tú fáa serkøna ráðgeving áðrenn tú byrjar. Við skipanini "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av fyritøku" kannst tú fáa ráðgeving fyri kr. 7.000,- hjá Virkisráðgeving Sp/f sum hjálpir tær í gongd.

- Ráðgevin verður tín samstarvsfelagi, tá ið tú avgerð at byrja við egnari fyritøku
- Tú fært hjálp til at gera eina virkisætlan, ið lýsir fullt út títt hugskot
- Tú fært eisini at vita um so er, at ætlanin ikki tykist burðardygg
- Virkisráðgevin kann eisini vísa til aðrar ráðgevarar, um tað gerst neyðugt

Ynskir tú at vita meira um "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av egnari fyritøku" so ring til TK-stovuna.

**TK-STOVAN**
Niels Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63

Sosialurin - 311820

Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**





# Undirvísingar- og mentamálastýrið
## Mentamáladeildin

# Sjúkrasystraskúli Føroya verður útbygdur við nýggjum útbúgvingum

Sjúkrasystraskúli Føroya fer eisini at fevna um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Í hesum sambandi verður skúlin styrktur við tveimum nýggjum deildarleiðarastørvum, t.e. einum deildarleiðara til hvørja útbúgvingarrás og einum felags rektara, ið fara at hava tætt samstarv. Hesi trý størv verða her lýst leys at søkja.

## Rektari

**Høvuðsuppgávur**
- Samskipan av útbúgvingunum
- Ábyrgd av málum viðv. starvsvenjingarplássum
- At skipa eina neyva fíggjarstýring
- Fyrisitingarligar uppgávur, t.d. at orða karmar, leiðreglur og normar fyri virksemi skúlans og starvsfólkamál
- Upptøka av lesandi og næmingum
- At røkja samskiftið við avvarðandi myndugleikar
- At taka lut í nevndararbeiði, fyriskipað av Undirvísingar- og Mentamálastýrinum
- At skipa fyri eftirútbúgving av egnum starvsfólki og bjóða út skeið
- Menningarvirksemi sum heild
- Ein ávís undirvísingarskylda

**Vit sóknast eftir einum rektara, ið**
- er sjúkrasystir við viðkomandi hægri útbúgving ella eftirútbúgving, og sum
- hevur vitan um og royndir innan námsfrøði og leiðslu
- hevur skil fyri fíggjarstýring og fyrisitingarligum viðurskiftum
- dugir væl at fyrisita/leiða og samstarva
- hevur royndir innan undirvísing og annað námsfrøðiligt virksemi.

Tað er av týdningi, at rektarin er før/ur fyri at leiða og fyrisita báðar útbúgvingarrásirnar, hevur virðing fyri og fatan av fakligum og persónligum margfeldi, og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Rektarin skal kunna savna, samskipa og hava yvirlit. Rektarin skal vera menningarsinnað/ur og kunna fáa í lag eitt álitisfult og mennandi samstarv bæði innan- og uttanhýsis.

Rektarin verður við til at seta bæði deildarleiðarastørvini.

## Deildarleiðari fyri sjúkrasystraútbúgvingina

**Høvuðsuppgávur**
- Vararektari tá rektarin er burturstaddur/burturstødd
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingini
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi lesandi
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

Vit sóknast eftir einum persóni, ið
- er sjúkrasystur við viðkomandi hægri útbúgving ella eftirútbúgving
- hevur vitan um og royndir innan útbúgvingarviðurskifti á hægri støði innan heilsuøkið
- hevur royndir innan gerð av útbúgvingarætlanum
- hevur royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av sjúrkasystraútbúgvingini
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri næmingar, lærarar og starvsfólk.

## Deildarleiðari fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar

**Høvuðsuppgávur**
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingunum
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi lesandi
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

Vit sóknast eftir einum persóni, ið
- hevur hægri útbúgving, ið kann metast at vera viðkomandi fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar
- hevur vitan um royndir innan útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið og innan miðnámsútbúgvingar
- hevur royndir innan gerð av útbúgvingarætlanum
- hevur royndir innan námsfrøði og heilsu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av almanna- og heilsuútbúgvingunum
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri næmingar, lærarar og starvsfólk.

**Vit bjóða**
Trý størv við avbjóðing, har tú verður við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina í skúlanum. Tú fer at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við skúlamyndugleikunum og stovnum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Størvini verða sett skjótast gjørligt. Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya ella avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving, fakligar og námsfrøðiligar royndir o.a. verður at senda til:

**Undirvísingar og Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26.06.2000, kl. 15.00.

Umsøkjari verður biðin um at upplýsa, hvat av størvunum søkt verður um, og um umsóknin møguliga fevnir um fleiri av størvunum.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum á tlf. 355050.

**Undirvísingar- og mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og ymiskum frítíðarvirksemi.

**Sjúkrasystraskúli Føroya** verður útbygdur til eisini at umfata tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar, og fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir. Onnur rásin er sjúkrasystraútbúgvingin, ið er ein miðallong framhaldsútbúgving, 45 mðr., og hin rásin fevnir um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Hesar umfata 1 ára longu almanna- og heilsuhjálparaútbúgvingina og 1 1/2 ára longu almanna- og heilsurøktaraútbúgvingina. Í løtuni eru um 9 størv á Sjúkrasystraskúla Føroya og økist hetta væntandi nakað, tá tann nýggja skipanin er farin at virka.

3arin ELECTRONIC

bjóðar bestu dygd innan teldur og telduútgerð.

Vit umboða m.a. Fujitsu og Siemens og hava eitt gott úrval av:

- TELDUM
- FARTELDUM
- KT-KALENDARUM
- FARTELEFONUM
- PC-SPØLUM
- PLAYSTATION
- PRINTARUM
- YM. TILHOYRI

*Hoyr meira um okkara kvøld-service*

*Góður í ráðum - við munadyggari service frá formula.fo*

3arin ELECTRONIC OG **formula.fo**
*SMS · Tel 353537 · Fax 353536*
*E-mail: tryarin@post.olivant.fo*

# Pedagogur

søkist 35 t. um vikuna til stovu við 20 børnum 3–7 ár, at byrja 1. aug.

Løn sambært sáttmála millum Førya Landsstýri og Pedagogfelagið.

Skrivlig umsókn við prógvi og viðmæli verður at senda til Dagstovnin áðrenn 5. juli. Nærri fæst at vita á tlf. 372700.

**Dagstovnurin Mýrifípan**
826 Trongisvágur

# Jørð í Hvalvík

Um hóskandi boð fæst, selja vit 5 gyllin í Húsadalshaga í Hvalvík.

Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**
Att: Fríða Patursson, adv.

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**